## Dumpaði 949 ferðir



Hin 68 ára gamla suðurkoreanska kvinnan, Cha Sa-soon, hevur leingi havt ein dreym um at fáa koyrikort til bil. Hon selir grønmeti í býnum Wanjang, og eitt koyrikort hevði tí verið nógv praktiskari hjá henni at havt. Eins og um okkara leiðir, noyðist tú í Suðurkorea at taka teoriroynd og koyriroynd, um tú skal fáa koyrikort til bil. Fyrstu ferð, Cha Sa-soon var uppi í teori, var í apríl í 2005. Men tað hevur ikki gingið betri enn væl hjá suðurkoreansku kvinnuni. Hinvegin vildi hon ongantíð geva skarvin yvir. Herfyri slapp hon so ígjøgnum nálareyga og stóð teoriroyndina, sum altso var roynd nummar 950 hjá henni. - Cha Sa-soon er kend her, og vit beundra hennara áhaldni og mót, sigur ein av koyrilærarunum við Korea Times. Nú er so suðurkoreanska kvinnan til reiðar at fara upp í koyring.

## Bjørnin ásetir ferðina

Tey, sum búgva í bygdini Churchill í kanadiska landspartinum Manitoba, eru von við at síggja ísbjarnir ganga í bygdini. Sambært AP eru ísbjarnir so vanligar har, at Churchill stundum verður umrødd sum heimsins ísbjarnarhøvuðsstaður. Hetta sæst eisini aftur í ferðsluni, skrivar AP, tí tað er ikki loyvt at koyra so skjótt í Churchill sum í bygdum øki aðrastaðni í Kanada. Churchill er við Hudsonánna, og viðurskiftini millum bygdarfólkið og bjarnirnar eru so góð, at samanbrestir eru sera sjáldsamir. Menn gera eisini alt fyri at sleppa undan at skjóta bjarnirnar, sjálvt um tær gerast ágangandi.

# Tríggjar føroyskar bøkur á donskum

**Hósdagin gevur forlagið Torgard út tríggjar føroyskar bøkur í danskari týðing.**

BÓKMENTIR
*Tíðindaskriv*

*Bøkurnar eru hesar:*
Krimisøgan »Korsmesse« eftir Jógvan Isaksen. Hetta er triðja bókin í krimirøðini hjá Jógvani um Hannis Martinsson, og snýr seg um grindadráp og djóraverndaraktivistar.

Høvundurin hevur sjálvur umsett bókina til danskt. Høgni Egholm Magnussen hevur gjørt permuna. Bókin er 272 síður og kostar 299 krónur.

Krimisøgurnar hjá Jógvani er týddar til fleiri mál, bæði danskt, íslendskt og týskt. »Korsmesse« er triðja bókin um Hannis Martinsson á donskum. Áður eru útgivnar »Blid er den færøske sommernat« (1991) og »Grå oktober« (1995) og fingu tær framur góð ummæli tá.

Eisini tann fyrsta barnakrimisøgan hjá Jógvani er givin út á donskum: »Brandstifteren« (1998).

»At danse med virkeligheden« er danska heitið á skaldsøguni »Tema við slankum« eftir Sólrún Michelsen. Sólrún fekk í fjør Bókmentavirðisløn M.A. Jacobsens fyri hesa bókina, sum er fyrsta bók hennara, ið er týdd til annað mál. Kirsten Brix hevur týtt til danskt, og Høgni Egholm Magnussen hevur gjørt permuna. Bókin er 125 síður og kostar 199 krónur.

Triðja føroyska bókin, ið Torgard gevur út nú í heyst er myndabókin »Poul, en cool giraf« eftir Bárð Oskarsson. Hugin Eide hevur umsett bókina, ið kostar 149 krónur.

Til donsku útgávuna eru allar myndirnar skannaðar av nýggjum, og danska útgávan er nakað væl litríkari enn føroyska upprunaútgávan. Eisini hevur bókin fingið annað permusnið, eins og hon er eitt sindur minni til støddar.

»Poul, en cool giraf« er triðja bókin hjá Bárði, sum Torgard gevur út. Tær báðar fyrru, »En hund, en kat og en mus« og »Kødbenet«, fingu góð ummæli í donsku bløðunum og netinum. Um ta fyrru skrivaði ummælarin Damian Arguimbau á Weekendavisen rætt og slætt: »... genial ... filosofisk og provokerende ... en klassiker ...«.

## Parkeringsansarar kring Vága Floghavn



Frá mikudegnum 11. november verða tað starvsfólk hjá sløkkiliðnum á Flogvøllinum, sum hava ábyrgdina av parkeringsansingini kring Vága Floghavn. Talan er um tíðaravmarkaðu parkeringina.

Umboð frá politinum og parkeringsansingini í Tórshavnar kommunu koma at leggja starvsfólkunum lag á. Tíðaravmarkaða parkeringin er galdandi alt samdøgrið.

*mg*



Bókaframløga:

# Ein gáva til Tórshavnar Kommunu

**Hósdagin klokkan 15: verða tær báðar bøkurnar Nólsoy søgubrot og fólk 1 og 2 lagdar fram í Posthúskjallaranum hjá Tórshavnar kommunu í Tórsgøtu.**

BÓKAFRAMLØGA
*Tíðindaskriv*

- Hetta er føðingardagsgáva frá Nólsoy til Tórshavnar kommunu, sum í ár fyllir 100, sigur Egon Hansen rithøvundur, sum verður til staðar tá bøkurnar verða lagdar fram.

Egon hevur seinastu árini savnað tilfar til bók um Nólsoy og er komin fram á nógvar áhugaverdar upplýsingar.

Fyrsti maður, ið búsettist á Nólsoynni æt Nól. Av honum fekk oyggin navnið Nólsoy. Søgnin sigur, at Gøtuskeggjar áttu Nólsoynna og høvdu seyð gangandi á henni.

Søgnin sigur eisini, at ein skotsk kongsdóttir hevur búð í Nólsoy. Hon skuldi vera komin við barn við einum aðalsmanni, sum pápin var illa í øgn við. Tey flýddu undan honum og búsettust í Korndali.

Í gomlum døgum varð helvtin av ognarjørðini seld orsakað av lógarbroti móti kirkjulógunum, og tí seldu kirkjumyndugleikarnir ¼ av jørðini, 12 merkur, til aðalsættirnar Benkestok og Rosenkrands við 275 áseyðum og 6 kúm. ¼ av haganum verður tí nevndur Junkarshagin.

Navnframi bátasmiðurin Johan Danielsen í Garði skuldi smíða næstan 1000 bátar í sínum langa lívi. Seinasta bátin, hann hevði eina hond í var, tá hann, farin um tey 90, spann síggið.

Tá ið viðurin til nýggja skúlan í 1836 skuldi førast úr Havn til Nólsoyar, hendi tann syrgiliga vanlukka, at báturin, ið førdi viðin og hevði ein flaka afturúr, gekk burtur í Nólsoyarfirði. 5 menn sjólótust á bátinum.

Tíðliga ein morgun læt eitt stórt fransaskip akkerið falla út fyri Nólsoyarvík. Ránsmenninir settu bátarnar á skipinum út og róðu í land. Flestir teirra fóru í hagan at ræna neyt og seyð. Teir høvdu fingið fatur á øllum neytunum í bygdini og rikið tey oman í fjøruna, har tey vórðu avlívað og førd um borð. Bert ein kúgv var eftiri í oynni.

Egon Hansen er føddur í Nólsoy 10. juli 1947. Hann tók læraraprógv í 1971 og varð settur í starv sum lærari við Føroya Spesialskúla. Í Århus 1976 tók hann prógv sum tali- og hoyrilærari og varð í 1979 settur sum tali- hoyriráðgevi í Sernámsráðgevingini. Hann hevur skrivað søguliga ritið um Nólsoyar kirkju, Kirkjan á Tanganum. Egon Hansen hevur við hesi bók lagt ein stein aftrat tí søguvarða, aðrir skrivandi nólsoyingar, ið undan eru farnir, hava laðað, okkum til vegvísingar.

### Skrá fyri bókaframløgu:

Heðin Mortensen, borgarstjóri, bjóðar vælkomin

Egon Hansen, rithøvundur, handar borgarstjóranum fyrstu eintøkini av Nólsoy søgubrot og fólk 1 og 2

Felagssangur: Nólsoyarsangurin/Nólsoyarvalsurin. Kim Hansen hevur fylgispælið

Egon Hansen, rithøvundur, leggur bøkurnar Nólsoy søgubrot og fólk 1 og 2 fram

Undir framløguni er ókeypis kaffi, te, djús og smákøkur at fáa. Eftir framløguna ber til at ogna sær bøkurnar, við heilsan frá høvundanum. Kim Hansen spælir tónleik eftir framløguna.

Tiltakið er alment!

## Landsstýrisbólkur viðgera kommunala umskipan

**Løgmaður sett politiskan arbeiðsbólk at viðgera kommunala umskipan**

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Løgmaður hevur sett ein politiskan arbeiðsbólk viðgera álitið hjá kommunalu umskipanarnevndini, »Kommunur, eindir og uppgávur 2009«.

Bólkurin skal m.a. áseta talið á kommunalum eindum, hvørji ábyrgdarøki skulu leggjast út til kommunurnar og nær næsta kommunalval verður. Málið er at leggja endaligt uppskot til kommunala umskipan fyri Løgtingið í vár.

Ætlanin er somuleiðis, at kommunala umskipanin skal til aðalorðaskifti í Løgtinginum í næstum.

Í politiska arbeiðsbólkinum eru Annika Olsen, landsstýriskvinna í innlendismálum, Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður í fíggjarmálum, Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í mentamálum og Rósa Samuelsen, landsstýriskvinna í almannamálum.